# Listasavnið valt vinnarar av teknikapping

**Tað gjørdust tey fimm, Hjalti Weihe, Ronja Rúnadóttir, Óðin Ellefsen, Albert MacDonald og Oddvør Ellingsgaard Dam, sum vunnu stóru teknikappingina hjá Listasavninum á Heystfagnaðinum**

KAPPING

*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Umframt myndaveiðu og rundvísingar skipaði Listasavn Føroya eisini fyri stórari teknikapping fyri børn á Heystfagnaðinum, sum var í heystfrítíðini. Heili 500 børn tóku lut í kappingini, og frá

Listasavinum frætta vit, at sera nógvar góðar og spennandi myndir vóru teknaðar hesar dagarnar. Úr stóra bunkanum hava fyriskipararnir nú valt fimm vinnaramyndir, eina fyri hvønn av teimum fimm aldursbólkunum. Tey fimm, sum hava vunnið, fáa ein góðan vinning frá Listasavninum í vikuni.

Her eru tekningarnar, sum vunnu:

*Í bólkinum 0 - 3 ár vann trý ára gamli Hjalti Weihe úr Hósvík. Hann hevur teknað eina gula strikutekning av tveimum figurum, har annar teirra flýgur móti hinum.*

*Í bólkinum 12 - 16 ár vann 15 ára gamla Oddvør Ellingsgaard Dam úr Havn. Hon hevur teknað eina unga kvinnu í fínum kjóla, sum sprettir upp úr jørðini. Myndin er væl teknað og hevur serliga fínar og skyggjandi litir í kjólanum.*

*Í bólkinum 3 - 5 ár vann fimm ára gamla Ronja Rúnadóttir úr Havn. Hon hevur teknað eina litfagra mynd av eini glaðari gentu í regni, einum súreplatræi og einum stórum hjarta.*

*Í bólkinum 8 - 12 ár vann 10 ára gamli Albert MacDonald úr Århus í Danmark. Hann hevur teknað ein diskodansandi mann í gulum buksum, reyðbrúnari russarahúgvu og sólbrillum. Albert hevur bygt myndina upp við nógvum fýrkantaðum puntum við diskoljósi í.*

*Í bólkinum 5 - 8 ár vann seks ára gamli Óðin Ellefsen úr Havn. Hann hevur teknað ein pinnamann, sum stendur heldur niðarlaga í vinstra horni á myndini. Nógv luft er aftanfyri og rundan um mannin og vísir okkum á tann lítla einstaklingin í tí stóru verðini.*

SKEIÐ

## „Vegurin sum arbeiðspláss“

Dagarnar 17.–21. november skipar Landsverk saman við Vejsektorens Efteruddannelse fyri skeiðnum „Vegurin sum arbeiðspláss.“

„Vegurin sum arbeiðspláss“ er eitt kravt skeið fyri tey, sum arbeiða á ella fram við landsvegunum, og er um trygd í sambandi við vegarbeiði.

Tvey sløg av skeiðum
Landsverk hevur skipað fyri hesum skeiði fyrr. Eftir lokið skeið fær luttakarin eitt prógv, sum síðan skal endurnýggjast fimta hvørt ár. Tíðin er nú komin, at tey, sum vóru á fyrsta skeiðnum, skulu hava prógvini endurnýggjað.

Talan er sostatt um tvey ymisk skeið; annað er fyri tey, sum ikki hava verið á skeiði fyrr (2 dagar), og hitt er endurtøkuskeið (1 dagur).

Kostnaður og tekning
Kostnaður fyri hvønn luttakara er 7.000 kr. fyri vanligt skeið og 5.000 kr. fyri endurtøkuskeiðið. Íroknað prísin er matur, skeiðstilfar og prógv. Pláss er fyri 20 luttakarum á hvørjum skeiði.

Til ber at tekna seg til skeiðið við at senda eitt teldubræv til Armgarð Steinhólm á ferðsludeplinum hjá Landsverki (armgard@lv.fo).

**Freistin er 3. november 2008.**

Lesið annars meira um skeiðið á www.landsverk.fo.

Skeiðini „Vegurin sum arbeiðspláss“ verða hildin hesar dagar:

| | |
|---|---|
| **17.–18. nov.** | **Byrjanarskeið** |
| **19. nov.** | **Endurtøkuskeið** |
| **20.–21. nov.** | **Byrjanarskeið** |

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, 110 Tórshavn | Tel. 340 800, Faks 340 801, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK byggir land

*Landsverk er stovnur undir Innlendismálaráðnum og hevur um hendi vega- og havnamyndugleikauppgávur og byggiharrauppgávur. Stovnurin ráðleggur og ger ætlanir, útinnir, rekur og viðlíkaheldur landsvegir, havnir, bygningar og flogvøllir, herundir tyrlupallar.*